# BØNARLØTAN

SEPTEMBER 2022 37. árg.

**1. Hósdagur** — *Sálm. 41*



*Biðið, at Harrin framvegis signar ferðina hjá Juvel II*

## GRØNLAND

### Juvel II

Ísur forðaði fyri at vitja Thuleøkið, men allar bygdirnar til og við Upernavikøkið vórðu náddar. Nú er Juvel II komin til Suðurgrønlands. Harrin hevur signað, og nógv hava ynskt at hoyra gleðiboðskapin, og fleiri hava møtt sínum Frelsara. Eftir lokna vitjan í Suðurgrønlandi verða vit í Eysturgrønlandi um 6. sept. Takk fyri stuðul og forbøn.

## KRINGVARPIÐ

18. sept. sjónvarpsmøti úr Berøa, Runavík
2. okt. útvarpsmøti frá mansstevnuni á Zarepta

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukv. kl. 21. Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21. Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## ONGLAND, Taunton
### Dorit og Simon Marshall

Vit fara til Lviv fyrsta sept. at vitja ECM-trúboðarar har. Tað hevur verið sera tungt hjá teimum, síðani kríggið brast á. Tey hava hjálpt ukrainskum flóttum. Síðst í sept. verða vit í Albania til IBCM Europe stevnuna, har Simon skal tala og hava fyrilestur.

| *2. Fríggjadagur* | *Neh. 3.15-32* |
|---|---|

## NTM - FØROYAR
### Noomi og Eli Christiansen
### Hadassa 11, Tabita 8, Debora 6, Natan 3

Biðið fyri Símeon Petersen og hinum næmingunum, sum byrja á bíbliuskúla á North Cotes College fyrst í sept. Nú kunnu næmingar aftur taka øll skeiðini á skúlanum. Vit takka Harranum fyri bønarsvar.

## ZAREPTA

Bíbliuskeið 29. aug.-4. sept., kvinnustevna 9.-11. sept., mansstevna 16.-18. sept., hjúnastevna I 23.-25. sept., hjúnastevna II 30. sept.–2. okt.

## *3. Leygardagur* *Ef. 4.1-16*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Møti í Kristnastovu eru fríggjakvøld kl. 20 og sunnumorgun kl. 11. Biðið fyri teimum nýggju lesandi, at tey verða varðveitt í trúnni, og at vit fáa vísdóm og styrki at leiða arbeiðið, so Harrin verður ærdur.



**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 15, Andreas 13, Kristina 11**

## *4. Sunnudagur* *Neh. 4.1-23*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Í aug. vórðu Estersbók, Jónasarbók, Jóhannesarevangeliið og 8 av brøvunum prentað. Tey, sum trúliga lesa, gleða seg at fáa nýggja tilfarið. Biðið, at tey trúgvandi lurta eftir bíbliutímunum, ið vórðu upptiknir, nú eingin undirvísing er. Ungi umsetarin byggir hús og skal giftast í nov. Eg fari til Senegal aftur nú í sept.

**FØROYAR**
- **Else og Poul Johan Djurhuus**
- **Anna Maria og Rógvi Joensen**
- **Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 13, Ester 11, Samuel 8**

## *5. Mánadagur* *Ef. 4.17-32*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit eru sera takksom fyri, at vit kunnu byrja aftur í sept. við øllum tiltøkunum, sum steðgaðu í mars 2020 vegna koronu. Nógv nýggj fólk eru løgd afturat, og samkoman veksur støðugt.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Takk fyri tíðina heima. Í Venesuela hevur trúboðarastevnan ikki verið í 6 ár, men verður tó nú 5-9. sept.

## *6. Týsdagur* *Neh. 5.1-19*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Skúlaárið á NTM skúlanum byrjar 6. sept. Biðið fyri næmingunum, sum tey byrja lesnaðin 22. sept. Eg vitji í Sorimi 28. okt., har eg skal arbeiða við bíbliuumseting og undirvísa úr Opinberingini.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Legurnar í summar gingu væl. Uttan tykkara hjálp hevði tað ikki verið møguligt. 6. sept. byrja vit Naalersitaq barnamøti og 13. sept. ungdómsmøti. Ætlanin er eisini at hava eitt ungdómsmøti fyri 17 ár og eldri.

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Vit takka fyri tíðina heima í summar og vóna, at vit hava verið til signing. Ætlanin er at byrja ráðgevingartænastu og at hava street outreach meira regluligt eisini. Fyrst í sept. skal visum hjá Anniku endurnýggjast. Biðið fyri hesum.

| *7. Mikudagur* | *Ef. 5.1-16* |
|---|---|

**FØROYAR**
**Anna og Óli Steinberg**
Eg eri boðin at vitja familjuna Saru og Rasmus Abelsen í Kitsissuarsuit, Hundaoyggjunum, í Grønlandi. Fari uml. 8 sept. Biðið Harran signa ferðina.

**-Elin og Jógvan Jacobsen**
**-Unn og Jógvan Zachariassen**
**-Lis Zachariassen**
**-Annika og Poul Færø**
**-Maria og Jens Bech**



| *8. Hósdagur* | *Sálm. 42 og 43* |
|---|---|

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
Vit komu ikki heim í summar, tí trupulleikar vóru at fáa innferðarloyvi til Kurt. Í sept. skal eg søkja um loyvi at verða verandi í Suðurafrika. Biðið fyri tænastuni. Broytingar eru í toyminum. (Langtíðar-)arbeiðsmenninir eru fáir, men skurðurin er stórur.

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Eg fari til Filipsoyggjar í sept. fyri at rættlesa Tessalonikubrøvini saman við Pablito, Rogancio og Galahad. Tá eg hoyri frá omanfyri nevndu brøðrum, at teir vitja fleiri samkomur og læra ápostlasøgutilfarið, sum nú er í teirra hondum, eggjar tað meg til at halda áfram. Teir hava verið sera trúfastir at læra Orð Guds í fleiri samkomum. Takkið Gudi, at fleiri eru doypt seinastu fáu mánaðirnar.

## *9. Fríggjadagur* *Jer. 5.1-17*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**



Eg undirvísi í Montgomery, og 9-15. sept. eru vit í Missouri, har vit vitja eina samkomu og vinir. Eisini vitja vit NMT venjingarskúlan. Nógv fyrireiking er í sambandi við møtir í Malaysia í okt. og til altjóða NTM leiðsluleguna í Teilandi í nov. Judy hevur ábyrgdina av øllum samskifti við luttakarar og við hotellið. Hetta er sera drúgt arbeiði, sum fevnir um nógvar vikur.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

**Í dag fyllir Sámuel Mikkelsen 8 ár**

## *10. Leygardagur* *1. Kor. 6.1-20*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Adonia 14**
STEVN verður ein heimasíða í framtíðini. Havið okkum í bønum tykkara, sum vit fyrireika alt tað, sum skal til. Shamila hevur hirðatænastu fyri pakistanskum kvinnum á netinum og fer eftir ætlan til Pakistan seinni í ár. Biðið fyri heilsu okkara.

## *11. Sunnudagur* *Jer. 5.18-31*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Vit fyrireika eina verkætlan at umseta Jóhannesarevangeliið til danskt og føroyskt teknmál, eitt nú við at søkja um stuðul til arbeiðið.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *12. Mánadagur* *1. Kor. 7.1-19*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**
Næstu tveir mánaðirnar fer Claire at dagføra handbók til nýggjar trúboðarar. Bókin skal vera hjálp hjá teimum at menna

góð sambond, so at tey fáa neyðugu hjálpina til at virka sum trúboðarar – bæði andaliga, kensluliga og fíggjarliga.

## *13. Týsdagur* *Jer. 6.1-15*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Vit takka fyri bønarsvar: at heilsan hevur verið góð í summar, legurnar hava gingið væl og at vit høvdu nóg mikið av fólki til øll starvsøki.

**Í dag fyllir Josva Mikkelsen 13 ár**

## *14. Mikudagur* *1. Kor. 7.20-40*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Túrurin norður til Ikerasak við Qaamaneq gekk sera væl.

## *15. Hósdagur* *Sálm. 44*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Ætlanin er, at vit bæði vitja í Føroyum 15. til 29. sept. Hóast tíðin er stutt, so vóna vit at kunna hitta mong av tykkum, sum trúliga minnast okkum í bønunum.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

**Í dag fylllir Kano Mortensen 13 ár og Sigrid Nónstein 15 ár**

## 16. Fríggjadagur — Jer. 6.16-30

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**

Vit virðismeta bønir tykkara í sambandi við mongu fyrireikingarnar til farloyvið í heyst.



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 10, Petra 8**

## 17. Leygardagur — 1. Kor. 8.1-13

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Saafi *Refuge House* er nú næstan liðugt og kann m.a. hýsa forfylgdum trúgvandi. Annað fundarvirksemi er eisini, s.s. bíbliuundirvísing fyri trúgvandi saafi, bæði ungum og eldri. Saafifólkið virðismetir at hava Jesus-filmin á sínum máli. Ov tíðliga er at meta um úrslit enn. Filmurin verður sýndur í nýggjari bygd hvønn mánað. Vit bæði halda á eftir førimuni, men orka minni enn áður. Takk fyri stuðulin.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Sunnudagur* *Jer. 7.1-20*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 10, Emma 6**



Tað er gott at vera í Føroyum og njóta samfelagið við vinir, familju og samkomur aftur. Noah er farin heim aftur til Italia, men vit og genturnar verða í Føroyum árið út.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

**Í dag fyllir Svend í Prestgarði 14 ár**

## *19. Mánadagur* *1. Kor. 9.1-27*

**ÍSLAND, Reykjavík**
**Kristín Gerðalíð**

Stóra takk fyri áhaldandi bøn og stuðul. Eg komi heim í nakrar mánaðir at arbeiða og møguliga í skúla seinni. Eg vóni at fara aftur at tæna Gudi í Íslandi í framtíðini, men enn er óvist, um og nær tað verður. Ætlanin er at koma heim í okt.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *20. Týsdagur* *Jer. 7.21-34*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 1**

Krissy er við barn, og er sett til at eiga 22. feb. Vit vóru á stuttari vitjan í PNG í aug. Vit ætla at flyta hagar næsta ár eftir lokna undirvísing í máli og mentan. Tað var gott at síggja staðið og at hitta trúboðarar, ið arbeiða á oynni. Biðið, at vit framhaldandi læra málið, um áræði á ferðini saman við Harranum, um vísdóm at uppala son okkara Zephaniah og um trygga viðgongutíð hjá Krissy. Ætlanin er, at hon skal eiga her í Indonesia.

## *21. Mikudagur* *1. Kor. 10.1-15*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

Í aug. høvdu vit skeið fyri 16 ungum fólkum, ið hava tænt við Ethnos 360 uttanlands síðsta árið. Vit hjálpa teimum at viðgera upplivingar og at finna seg til rættis eftir heimkomuna. Biðið, at tey halda áfram at fylgja Jesusi, hvar enn Hann so leiðir tey.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah 8, Abigail 3**

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

## *22. Hósdagur* *Sálm. 45*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**

Tað hevur verið gott aftur at koma í samband við familju og vinir her í Týsklandi. Vit læra okkum kovolmál og -mentan, tá vit hava møguleika. Vit ringdu til nakrar av okkara vinum í Kovol, og tað var gott at tosa við tey. Biðið fyri okkum, sum vit royna at býta tíðina millum fundir, málvenjing og familju.

## *23. Fríggjadagur* *1. Sám. 5.1-12*

**DANMARK, Kristnastova**
**Susan og Øssur Berghamar**



Mong hava verið niðri í sjúkraørindum í summar, so andaktirnar á hotellinum hava verið væl vitjaðar, og fleiri eru komin á møti í Kristnastovu. Biðið fyri hesi tænastu, eisini við fráboðan. Eldrasamkoma verður aftur mikudagin 28. september kl. 15.
berghamar@kristnastova.dk

## *24. Leygardagur* *Fil. 1.1-11*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2**

Vit vænta okkara 4. barn um 4 vikur. Biðið fyri móður og barni, og at tað skal gangast okkum skjótt og væl at fáa pass og innfararloyvi til barnið. Vit taka saman um okkara tænastu her í USA og fyrireika okkum at fara til Papua Nýgunea, har

vit skulu arbeiða við at seta samkomur á stovn í ættarbólkum. Í nov. vitja vit okkara heimasamkomu í Indiana og fara til Papua Nýgunea í jan.

**Í dag fyllir Jude Poulsen 4 ár**

## *25. Sunnudagur* — *1. Sám. 6.1-21*

### JAPAN
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 10, Louie 8, Rio 3**
Vit umhugsa, hvussu vit kunnu tillaga møtini og møguliga hava eitt aftrat, so tað verður lættari hjá nýggjum trúgvandi, ikki-trúgvandi og familjum at koma. Biðið um Guds leiðslu og vísdóm.

### USA
**Julie og Sonni Poulsen**
Tey eru flutt til USA at búgva av heilsuávum.

### OM, LOGOS HOPE
Biðið, at Logos Hope fær loyvi at vitja havnir í Norðurafrika. Biðið fyri Rutt J. Jacobsen úr Tórshavn, sum er farin á STEP-programmið við Logos Hope, og fyri Sámali Rasmussen og Hannu Berghamar umborð.

## *26. Mánadagur* — *Fil. 1.12-30*

### SENEGAL, Dakar
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 13**
Vit verða í farloyvi árið út og fara aftur til Senegal í jan.

2023. Tíðin í USA saman við familju og stuðlum hevur verið stimbrandi. Vónandi síggja vit nógv tykkara, nú vit eru heima fram til 2. nov. Biðið fyri ungum trúgvandi manni í Guinea; heilsan hevur ikki verið so góð, og hann leitar eftir arbeiði.

## *27. Týsdagur* *1. Sám. 7.1-17*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 14, Jónatan 12, Markus 10, Evita 7, Joy 5**

Biðið fyri samkomuni í Puruandiro og fyri okkara tíð í Esbjerg, har vit ætla at vera í nakrar mánaðir og virka útfrá Frikirken í Mølleparken.

## *28. Mikudagur* *Fil. 2.1-18*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Eri á Filipsoyggjum og hjálpi umsetarum. Hetta er fyrstu ferð síðani COVID-19, at tað hevur borið til at verið her, so nógv arbeiði liggur á láni.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**

## *29. Hósdagur* *Sálm. 46*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg fari aftur til Meksiko síðst í sept. Takkið, at læknakanningarnar ikki bendu á nakað álvarsligt. Biðið um vísdóm at endurskoða týðingina av Matteusarevangelium og Rómbrævinum.

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 8**

Biðið, at fleiri starvsfólk leggjast afturat okkum í The Well International.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *30. Fríggjadagur* *1. Sám. 8.1-22*

### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

### NÝGGJ BÓK!

**221 síður 190 kr.**

Ein av kendastu bókunum hjá enska høvundanum C.S. Lewis – The Problem of Pain – er júst komin út á donskum í nýggjari týðing. Hon snýr seg um spurningar, flestu menniskju fyrr ella seinni spyrja: hvat er endamálið við líðingini? og hví letur ein almáttugur Gud líðing raka okkum menniskju? Er andsøgn millum ein Gud, sum er góður og almáttugur, og tann veruleika, at líðing og pína finst í heiminum. Við óvanliga góðum innliti í mannahugsan og náttúru menniskjans viðger C.S. Lewis meistarliga hesar spurningar.




Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.-frí. kl. 14.00-17.30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos